Heri Mortensen, fyrrverandi stjóri - nú útróðrarmaður:

– Vit gloyma útróðurin

JAN MÜLLER

Hann hevur eina rættiliga spennandi og fjølbroytta fortíð. Frá stoypibransjuni í Danmark til stjórasessin í Tvøroyrar Flakavirki og seinni í Atlantsflogi til nú at vera útróðrarmaður og kommunalpolitikari. Maðurin vit tosa um og við er Heri Mortensen, tvøramaður við stórum T.

Lítið hevur verið at hoyrt til henda annars sera bersøgna og avgjørda mann, síðani hann rættiliga var í brennideplinum. Flestu munnu minnast hansara mongu rámandi og avgjørdu úttalilsi um føroyskan fiskivinnu- og fiskasølupolitikk ella mangul uppá sama.

Í dag er Heri Mortensen útróðrarmaður. Men sum kommunalpolitikari fær hann tó innlit í og eisini ávirkan á gongdina á øðrum økjum í samfelagnum. Eitt av teimum málunum, sum Heri Mortensen er farin at vísa serstakan ans er spurningurin um, hvussu ein komandi oljuvinna kann gagna heimbygdini og Suðuroynni annars.

Hera dámar væl sjólívið. Men tað er ikki bara at siga tað at vera útróðrarmaður í dag. Hevur tú sett teg í stóra skuld við báti ol. so kann tað vera sera torført at fáa endarnar at røkka saman. Eitt nú er tað trupult hjá ungum monnum at gerast útróðrarmenn, skulu teir seta seg í skuld. Heri Mortensen gevur myndugleik-unum ein stóran part av skulduni fyri tí ringu støðu útróðrarmenn eru í. Fyrr var tað so, at útróðrarmaðurin fekk hjálp, um hann ikki fiskaði nóg mikið. Tann møguleikan hevur landsstýrið tikið frá útróðrarmonnunum. Ístaðin fyri eina minstulønarskipan fyri útróðrarmenn er komin ein bonusskipan. Fyri at fáa eitt einasta oyra frá tí almenna skal útróðrarmaðurin hava fiskað fyri 54.000 kr. í seks mánaðir. Hetta hevur havt við sær, at flestu útróðrarmenn eru farnir úr skipanini, tí fiskaríið hevur verið so lítið í ár. Tí sansar tað í veruleikanum at hjá útróðrarmonnunum í dag. Meginparturin av teimum líða neyð, hava teir ikki konu, sum hevur gott arbeiði. Teir fáa ongan stuðul nakra aðrastaðni.

Heri Mortensen sigur, at útróðrarmenn eru tann einasti stættin í øllum landinum, sum einki fær.

-Okkurt má gerast fyri at varðveita útróðrarmentanina. Eg ivist ikki í, at leggja politikararnir høvur í blot, so kunnu teir finna fram til eina skipan, sum kann tryggja útróðrarmannin, tá lítil fiskiskapur er.

-Men tosað verður um at fara burtur frá stuðulinum!

-Tað er rætt, men so er tað eisini skeivt at loyva trolarunum at taka fiskin hjá útróðrarmanninum.

Útróðrarfiskur bestur

Vit spurdu Hera Mortensen, hvussu týdningarmiklan hann metir útróðurin at vera fyri føroyingar í dag?

- Nú havi eg bert verið útróðrarmaður í eini fimm ár, so tað er avmarkað, hvat eg havi innlit í. Men eg ivist ikki í, at útróðurin gevur ein tann besta fiskin, sum kem-ur uppá land í Føroyum. Verður rætt atborið, so hava vit her eina fyrsta floks vøru, sum kann seljast fyri 1. floks prís.



Heri Mortensen á útróðri

Heri Mortensen viðgongur, at hyggur man nøkur ár aftur í tíðina, so sóu mangir menn ikki framum sína egnu nøs. Har var bara talan um nøgdir og at selja blokk. Tú legði teg ikki eftir at fáa tað besta burtur úr tí besta fiskinum. Í hesum sambandi vísir hann eisini á, hvussu stór mótstøða var móti kongafiskavinnuni. -Tá høvdu vit eina sølu í Føroyum, sum Gud havi lov ikki er til meira, og sum gjørdi alt tað hon kundi fyri at forða fyri troyta kongafiskin.

Heri Mortensen sigur seg vera sannførdan um, at hevði stuðulin ikki verið tikin so bráddliga burtur, so hevði nógv av tí, sum menn fóru undir at byggja upp, verið vælvirkandi vinna í dag.

Fyrrverandi flakavirkisstjórin heldur, at vit føroyingar eiga at seta alt inn á at fáa góð sølufólk, tí vit eiga heimsins besta fisk. -Norðmenn hava tikið í egnan barm og ásanna, at teir duga ikki nóg væl. Teir hava tí fingið sær danskar sølumenn. Hetta er nakað, sum vit kanska eisini áttu at tikið til eftirtektar.

Útjaðarin

Aftrat hesum mugu vit fara undir at troyta øll fiskasløg. Heri Mortensen heldur vit eiga at hjúkla um útróðurin, tí hann heldur lívið í mongum bygdum og vísir m.a. til Famien, Hest oa. -Tað nyttar ikki, at vit lata trolararnar stoyggja og taka fiskin, sum útróðrarmenn annars eiga. Tað hevði verið frægari at latið trolararnar varðveitt fløgustuðulin, heldur enn at koyra teir inn á útróðrarleiðirnar at ræna fiskin frá hesi vinnuni.

Heri Mortensen vísir á, at tá politikarar nú eru farnir undir at tosa um at halda lív í útjaðararnum, so eiga teir avgjørt at taka útróðurin við, tí nógva staðni er tað júst útróðurin, sum er fortreytin fyri varðveiting av búsetingini.

Drelnesbasin stóran týdning fyri Suðuroynna

JAN MÜLLER

Er útróðurin ein nýggj verð fyri Hera Mortensen, so er ein komandi oljuvinna tað ikki minni. Sum kommunalpolitikari og har serstakliga sum limur í Vinnunevndini hevur Heri Mortensen havt møguleika at snodda eitt sindur til hesa nýggju verð. Hann var tí eisini millum teir mongu føroyingar, sum leitaðu sær til Aberdeen á oljumessu herfyri.

-Við mínum drúgvu royndum frá fiskivinnuni eri eg sannførdur um, at okkara samfelag eisini hevur tørv á íkasti frá onkrari aðrari vinnu. Ein komandi oljuvinna er eitt gott boð í so máta.

Heri Mortensen heldur tó, at vit mugu ansa eftir ikki at gloyma fiskivinnuna, hóast ein nýggj vinna sum oljan tekur dik á seg. Fiskivinnan hevur verið og vil framhaldandi at vera okkara høvuðsálit, og tí vil hon altíð vera nr. 1. Men nú olja og gass tykist liggja goymt í føroysku undirgrundini eiga vit eisini at troyta hesi ráevni heldur hann.

Heri Mortensen nýtti høvi at kunna seg um oljuvinnu á altjóða støði á oljumessuni í Aberdeen. Hann dylur ikki fyri, at hjarta fyrst og fremst brennir fyri eini oljuútgerðarhavn á Drelnesi. Tí er Heri Mortensen eisini sera fegin um tað arbeiði, sum longu er lagt í eina oljuútgerðarhavn á Drelnesi, sum hann metir kann fáa alstóran týdning fyri alla oynna. Hann metir eisini, at básurin hjá Norserv (tað er verkætlanin fyri Drelnes) vakti stóran ans á oljumessuni.

Heri Mortensen á oljumessuni í Aberdeen, her saman við Sten Hansen frá Danbor Service, sum er við í Drelnesverkætlanini. Mynd Jan Müller

-Tað er einki skeivt í tí at siga, at vit vóna, at ein offshorebasi verður til veruleika her á Tvøroyri. Sjálvur haldi eg eisini, at nettupp Drelnes er best egnaða plássið til oljuútgerðarhavn. Nógv bendir eisini á, at tað verður við markið norðan fyri bretsku oljukeldurnar, at oljufeløgini fara at bora. Tvs. at tað tí verður stytsta leið at sigla á Tvøroyri. Eisini tá talan er um at flyta fólk millum flogvøll og útgerðarskip.

Heri Mortensen vísir eisini á, at verður ein oljudálking á boriøkinum, so hevur tað alt at siga at kunna koma skjótt á staðið. Antin mást tú hava stytstu leið at sigla, ella mást tú hava skip á staðnum, sum er útgjørt til at taka sær av slíkari dálking.

-Vit mugu gera okkum greitt, at oljan uttan iva fer at verða eitt alternativ til fiskivinnuna.

Í sambandi við oljumessuna í Aberdeen nýttu umboð fyri Tvøroyrar Kommunu høvi til at vitja í Peterhead. -Ynskið okkara er at fáa eitt samstarv í lag við býin og serstakliga á fiskivinnuøkinum.

Wonderland MADRASSEN

Madrassan, sum hóskar júst til tín.
Hon lagar seg eftir **tínum** kroppi...

Tá tú velur madrassu, er sera umráðandi, at tú gevur tær góðar stundir at finna fram til ta heilt røttu.
Hon má ikki vera ov bleyt, tí so søkkur tú ov langt niður í hana, men heldur ikki ov hørð, tí tá liggur tú omaná og fær ikki røttu stúttuna.

Herre gårds serien



Madrassan skal tí passa til tína vekt og longd. Yvirmadrassan skal vera úr tilfari, sum ikki stjelur hita, men sum alikavæl "andar". Eisini skal ein góð madrassa kunna reinsast.

Activ serien

Vit eru altíð til reiðar at hjálpa tær at finna ta heilt røttu Wonderland-madrassuna til tín. Tú kanst eisini fara á internetið og fáa vegleiðing um, hvat slag av madrassu, tú skalt velja.
Adressan er: **www.westnofa.com**

EINAUMBOÐ Í FØROYUM

BRANDAL

Klaksviksvegur 72 • Fo - 700 Klaksvík • Postboks 9
Tel. 45 54 34 • Fax 45 53 64

WONDERLAND • WONDERLAND • WONDERLAND • WONDERLAND • WONDER